Vit ynskja øllum eina góða Jóansøku



SUÐUROYAR SPARIKASSI

Sosialurin - 311820



BREYÐKASSIN



Umframt breyð og køkur av ymiskum slag, selja vit á Jóansøku eisini pizza, smyrt breyð og toast

Vit hava opið soleiðis á Jóansøku:
Fríggjadagin 23/6 kl. 07.00-23.00
Leygardagin 24/6 kl. 07.00-23.00
Sunnudagin 25/6 kl. 14.00-23.00

Leygardagin selja vit morgunbreyð fyri kr. 2,50

GÓÐA JÓANSØKU

BREYÐKASSIN

v/ Eyðbritt & Arnleyð Vágur • Tel. 37 37 37

Sosialurin - 311820



Góðu Jóansøkugestir

Støkkið inn á gólvið, fáið ein leskidrykk, FÓM-ís ella góðgæti. Umframt hetta hava vit eitt stórt úrval av kortum til eitthvørt endamál.

Tann lítli handilin við sjeyti árum á baki.

Fa. ELLEN DAHL
v/ Solveig Johansen
Vágur • Tel. 37 30 86

Sosialurin - 311820



Framkomnar loysnir innan el-arbeiði

til ídnað, fiskivinnu, handverk og húsarhald



- Stýringar og talvur
- El-inleggingar
- Nýgerð og umvæling
- El-motorar og onnur el-tól
- Ávaringarskipanir (Telefon/GSM)

Heri Mortensen
Góðk. el-innleggjari/ráðgevandi el-verkfr.
FO-900 Vágur, Tel. 37 47 57, Fartel. 21 47 57

Sosialurin - 311820



TIL FØROYSKA BÚNAN

TIL BØRN: Tin & silvur plet.
TIL VAKSIN: Silvurplet & sterling.
HEIL SETT ELLA STØK
T.d. Møtlaspennir • Brosjur Spennir • Mallur • Stimar Knappar o.a.

*Fæst hesi støð:* Suðuroyar Heimavirki, Eysturoyar Heimavirki, Norðoyar Heimavirki, Prýði flogvøllurin og Sirri í Vágsbotni.
Framleitt hevur TORGERÐ SUÐUROY 373169

Sosialurin - 311820



sosialurin
-har tað hendir


Góða Jóansøku



# Bara fýra børn fødd allari syðru helvt í Suðuroy í ár

*Tann vánaliga gongdin, sum sást av álvara í fjør, sær út til at halda fram í ár. Í fjør vóru bara 13 børn fødd í allari syðru helvt í Suðuroynni og hóast hetta árið er hálvrunnið nú, eru bara fýra børn fødd í ár. Í Suðuroyar Norðaru helvt sær munandi frægari út*

ÁKI BERTHOLDSEN

Alt bendir á, at tann vánaliga gongdin, sum í fjør tók seg upp viðvíkjandi barnatalinum í syðru helvt í Suðuroynni, fer at halda fram í ár.

Higartil í ár eru nevniliga bara fýra børn fødd í allari syðru helvt í Suðuroynni, hóast árið er hálvrunnið.

Hesi seinastu árini eru ímillum 22 og 40 fødd í syðru helvt í Suðuroynni.

Men eisini síðani kreppa og fráflyting fór at taka seg upp nú í níti árinum, hevur talið verið rættiliga støðugt við tað, at nøkur og tjúgu børn eru fødd í syðru helvt í Suðuroynni um árið.

Tað, sum verður roknað upp í syðru helvt eru Sumba, Lopra, Akrar, Vágur, Nes, Porkeri og Hov.

Í hesum bygdunum búgva nú 2.282 fólk.

### Bara fimm børn

Men í fjør hendi so ein ógvuslig lækking í barnsburðartalinum.

Tá ið komið var heilt út í oktober mánaða í 1999, vóru bara fimm børn fødd í allari syðru helvt í Suðuroynni.

Og tá ið alt árið varð gjørt, vísti tað seg at bara 13 børn vóru fødd í allari syðru helvt í Suðuroy í alt 1999.

Hetta er bara helvtin av tí, sum tað plagdi vera.

Fallið er sera stórt, tá ið hugsað verður um, at í 1998 vórðu fødd 28 børn í syðru helvt í Suðuroy, í 1997 var talan um 25 børn, í 1996 vóru 26 børn fødd í 1995 var talið 25, og soleiðis hava tølini ligið støðug tað mesta av nítiárunum.

Og tað, sum farið er av árinum í ár, vísir, at gongdin heldur fram og støðan verður ikki frægari í ár.

### Frægari í norðaru helvt

Í norðaru helvt í Suðuroynni stendur eitt sindur frægari til, tí har var barnatalið í fjør ikki stórt ørðvísi, enn tað hevur verið seinastu árini.

Í norðaru helvt, sum er Fámjin, Øravík, Tvøroyri, Froðba, Hvalba og Sandvík, eru børn fødd higartil í ár. Í hesum bygdunum búgva í løtuni 2.708 fólk

Hesi seinastu árini hevur talið á føddum børnum ligið støðugt omanfyri 30 í norðaru helvt í Suðuroy, burtursæð frá 1996, sum var ringasta árið, tí tá vóru bara 23 børn fødd í norðaru helvt í Suðuroy.

Verða so barnsburðartølini í allari oynni løgd saman, vórðu ikki fleiri enn 41 børn fødd í allari Suðuroynni higartil í ár.

Og tað er ikki meiri enn helvtin av tí, tað plagdi vera.

Higartil í ár eru 16 børn fødd í norðaru helvt í Suðuroynni.

Eileen Michelsen, ljósmóður á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sigur, at hon væntar, at talið á barnsburðum í ár fer at vera áleið tað sama sum í fjør.

Sostatt verður hetta annað árið á rað, at talið á børnum, sum verða fødd í Suðuroynni sum heild, ikki verður meiri enn 2/3 av tí, sum tað plagdi.

Men hetta verður eisini annað árið á rað, at talið á børnum, sum verða fødd til syðru helvt í Suðuroy, ikki verður meiri enn helvtin av tí, sum tað plagdi vera.

### Færri enn 5.000 fólk

At talið á føddum børnum lækkar er í samsvari við gongdina í fólkatalinum annars.

Tí hesi seinastu árini er fólkatalið í Suðuroynni javnt og samt lækkað, og seinasta summar fór tað niður um 5.000 fólk fyri fyrstu ferð í yvir 50 ár.

Upplýsingar frá Landsfólkayvirlitinum siga, at nú búgva ikki fleiri enn 4.990 fólk í Suðuroynni.

Og nú er fólkatalið enntá hækkað eitt sindur aftur, tí eitt skifti seinasta summar búðu ikki fleiri enn 4.964 fólk í Suðuroynni og hetta var fyrstu ferð í yvir 50 ár, at fólkatalið í Suðuroy fór niður um 5.000 fólk.

Við árslok í fjør var tað tó komið uppaftur á 5.001 fólk, men síðani er tað so aftur fallið.

Men nú skulu vit eisini minnast til, at teir báðir stóru fráflytingarmánaðirnir, august og september, eru ikki farnir aftur um enn.

Eftir upplýsingum, vit hava, búði 5.518 fólk í Suðuroynni í 1930 og í 1950 kom fólkatalið í Suðuroynni í hæddina, tí tá búðu 6.213 fólk í syðstu oyggini í Føroyum.

– Tað er serliga nú í nítiárunum, at fólkatalið í Suðuroynni er rapað niðureftir og í ár hevur tað ligið og riðað um 5.000 fólk.

Støðan í Suðuroynni er eisini tann, at hon er einasta plássið í Suðuroynni. at tað doyggja nógv fleiri fólk, enn tað verða fødd.

Í fjør vórðu, sum sagt 41 børn fødd í Suðuroynni, men tað doyði yvir 70 fólk.

Og eisini higartil í ár eru tvær ferðir so nógv fólk deyð, sum tað eru børn ið eru fødd.

Tá ið fólkatalið so ikki minkar meiri, stendst tað av, at tað er ein ávís tilflyting til tær ymsu kommunurnar.

Serliga eru tað fólk, sum flyta uttanlands til ymsar kommunur í Suðuroynni.

Og alt í alt fellur fólkatalið í Suðuroynni framvegis. Í fjør minkaði fólkatalið í øllum bygdum, uttan í Hvalbiar Kommunu, har 12 fólk løgdust afturat.

Fyrsta ársfjórðing í ár er fólkatalið hinvegin minkað eitt vet í øllum bygdum, uttan á Tvøroyri har 32 fólk løgdust afturat fyrsta ársfjórðing í ár. Sí annars talvuna niðanfyri.

## Børn, fødd í Suðuroy seinastu árini

| | Syðra helvt | Norðara helvt | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| 1991: | 40 | 50 | 90 |
| 1992: | 34 | 37 | 71 |
| 1993: | 25 | 47 | 72 |
| 1994: | 22 | 38 | 60 |
| 1995: | 25 | 41 | 66 |
| 1996: | 26 | 23 | 49 |
| 1997: | 25 | 33 | 58 |
| 1998: | 28 | 32 | 60 |
| 1999: | 13 | 28 | 41 |
| Higartil í ár: | 4 | 16 | 20 |

Syðra helvt eru Sumba, Lopra, Akrar, Vágur, Porkeri og Hov.
Norðara helvt er Øravík, Fámjin, Tvøroyri, Froðba, Hvalba og Sandvík

*Hendan talvan vísir, hvussu nógv børn eru fødd í Suðuroynni seinastu árini og, hvussu nógv børn eru fødd í syðru helvt afturímóti norðaru helvt. Sum tað sæst, er barnatalið mundi fallið seinastu árini og 2000 verður annað árið á rað, at barnatalið í Suðuroynni bara er 2/3 av tí vanliga. Og hetta verður eisini annað árið á rað at barnatalið í syðru helvt í Suðuroy bara er helvtin av tí tað hevur verið tey seinastu, nógvu árini*

| | 1999 | | | | 1/1. - 31/3.2000 | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kommuna | Flutt frá | Flutt til | Fødd | Deyð | Flutt frá | Flutt til | Fødd | Deyð |
| Hvalbiar | 20 | 34 | 6 | 8 | 11 | 2 | 1 | 2 |
| Tvøroyrar | 106 | 106 | 24 | 27 | 15 | 50 | 8 | 11 |
| Fámjins | 5 | 1 | 0 | 3 | 5 | 0 | 1 | 0 |
| Hovs | 6 | 7 | 0 | 4 | 5 | 0 | 1 | 0 |
| Porkeris | 17 | 17 | 3 | 3 | 5 | 2 | 1 | 0 |
| Vágs | 78 | 74 | 5 | 16 | 23 | 20 | 3 | 6 |
| Sumbiar | 29 | 17 | 1 | 10 | 1 | 3 | 0 | 2 |

*Hendan talvan vísir, hvussu nógv stór fráflyting og tilflyting hevur verið í teimum ymsu kommununum í Suðuroy og fjør og fyrsta fjórðingsár í ár. Tá ið tølini, fyri børn, sum eru fødd, verða tald saman, verður tað til, at 39 børn eru fødd í Suðuroynni í fjør. Hetta eru tvey færri enn ljósmóðurin gevur upp, men hetta er bara talan um smávegis rættingar í tølunum*

## Gongdin í fólkatalinum í Suðuroy seinastu 50 árini

| Ár | 1950 | 1960 | 1970 | 1980 | 1990 | 1992 | 1994 | 1996 | 1998 | 1999 | nú |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hvalbiar komm. | 817 | 824 | 788 | 837 | 835 | 846 | 787 | 774 | 766 | 767 | 773 |
| Tvøroyar | 2.104 | 2.038 | 2.015 | 2.157 | 2.124 | 2.026 | 1.863 | 1.817 | 1.793 | 1.807 | 1.822 |
| Fámjins | 226 | 185 | 141 | 142 | 127 | 137 | 125 | 119 | 123 | 121 | 113 |
| Hovs | 195 | 184 | 159 | 147 | 165 | 167 | 143 | 131 | 124 | 122 | 120 |
| Porkeris | 452 | 406 | 341 | 337 | 395 | 411 | 400 | 371 | 359 | 355 | 359 |
| Vágs | 1.730 | 1.739 | 1.554 | 1.746 | 1.690 | 1.551 | 1.437 | 1.397 | 1.419 | 1.408 | 1.403 |
| Sumbiar | 689 | 651 | 557 | 554 | 518 | 504 | 458 | 434 | 424 | 421 | 400 |
| **Tilsamans** | **6.213** | **6.027** | **5.555** | **5.920** | **5.854** | **5.642** | **5.213** | **5.043** | **5.010** | **5.001** | **4.990** |